# Løgmaður gubbi Knút

Leygardagin doypti løgmaður áheitan frá donsku sjóverjuni eitt nýtt skip, sum verður latið sjóverjuni til nýtslu á Norðuratlantshavinum serstakliga við Føroyar og Grønland. Skipið varð doypt ”Knud Rasmussen”. Løgmaður sigur, at hann á henda hátt fær høvi at undirstrika týdningin, danska sjóverjan hevur havt fyri trygdina í føroyskum sjóøki umframt mongu bjargingartiltøkini og sjúkraflutningar. Skipið er bygt á Karstensen Skipasmiðjuni í Skagen. Tað er 74 metrar langt og 14,60 metrar breitt. Ferðin verður 17 míl og manningin verður 18 í tali.



# Kanska ikki fyrstu ferð

Tá íslendska sjóverjan tók smuglarabátin á Fáskrúðsfirði í síðstu viku, var tað kanska ikki fyrstu ferð, at menn hava smuglað rúsevni hagar í stuttleikabáti. Morgunblaðið hevur í hvussu er fingið at vita, at í 2005 kom ein norskur stuttleikabátur til Fáskrúðsfjarðar, og at hann varð liggjandi líka til árið eftir, tá onkur kom eftir honum. Fremmandir menn komu við bátinum, og fremmandir fóru við honum eftir at hava goldið havnargjald.

# Løgreglan í Føroyum gjørt størsta narkotika-kvett í søguni

**Løgreglan í Føroyum hevur lagt hald á tvey kilo av hørðum rúsevnum og tað er nógv størsta mongd av hørðum rúsevnum, sum løgreglan nakrantíð hevur funnið í einum**

SMUGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Um vikuskiftið fann løgreglan í Føroyum størstu nøgd av hørðum rúsevnum, sum nakrantíð er funnin í Føroyum. Hetta er ein partur av einum rúsevnamáli, sum fevnir um fleiri lond*
*Savnsmynd*

Nú um vikuskiftið gjørdi løgreglan í Føroyum eitt satt narkotika-kvett.

Tað hendi, tá ið løgreglan gjørdi húsarannsóknir í fleiri húsum og tí sambandi vórðu hald lagt á heili tvey kilo av rúsevnum.

Talan var um 0,9 kilo av amfetamini og 1,1 kilo av pulvuri, sum løgreglan metir er pulvur at gera ecstasy burturúr. Men nú skulu tekniskar kanningar endaliga staðfesta, hvat evni talan er um, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni í Føroyum.

Sostatt bendir alt á, at talan var um tvey kilo av hørðum rúsevnum og tað er nógv størsta mongd av hørðum rúsevnum, sum løgreglan í Føroyum nakrantíð hevur lagt hald á í einum.

Tá ið tað ræður um hørð rúsevni, hevur tað ongantíð verið talan um meiri enn nøkur hundrað gramm ísenn, men hesuferð var talan um heili tvey kilo.

Tilsamans er sannlíkt, at hesi evnini lættliga kunnu hava eitt søluvirði í Føroyum upp á yvir eina millión, alt eftir, hvørji evni tær teknisku kanningar vísa, at talan er um í hesum føri.

- Í hesum sambandi handtóku vit tveir mans og fríggjadagin vóru teir settur í grundlógaravhoyring í Føroya Rætti. Har varð annar av teimum fongslaður í fýra vikur, sigur Bergleif Brimvík

Eftir avhoyringarnar í rættinum slepti ákæruvaldið kravinum um at varðhaldsfongsla hin mannin eisini. Hann er sostatt leyslatin aftur, men hann er framvegis skuldsettur.

Teir noktaðu seg sekar.

Tilsamans eru teir báðir skuldsettir fyri at hava hjálpt til at goyma og skipað fyri flutningi av heili 24 kilo av amfetamini, 14 kilo av ecstasypulvuri og 1000 ecstasytablettum.

Tvey kilo av hesum vórðu løgd upp og goymd í Føroyum ímeðan restin fór víðari til Íslands í einum stuttleikabáti.

Men eisini tann ferðin endaði brádliga, tí í Íslandi stóð løgreglan fyri teimum og har vórðu eisini nakrir mans handtiknir.

Annars eru fólk handtikin bæði í Danmark og í Noregi í hesum sama máli

## Altjóða samstarv

Í sambandi við hetta rúsevnamáli, hevur løgreglan í Føroyum verið í einum tøttum, altjóða samstarvi, sum umfatar bæði føroyskar, íslendskar, danskar myndugleikar, umframt løgregluna í øðrum londum, bæði løgreglu og tollvald.

Bergleif Brimvík sigur, at tað var Europol, sum fyri nøkrum døgum síðani heitt á løgregluna í Føroyum um at kanna eftir um ein ávísur stuttleikabátur var at finna í føroyskari havn.

- Vit funnu bátin og síðani hava vit hildið eyga við honum.

Báturin skuldi til Íslands, men tað er sumt, sum bendir á, at teir fingu trupulleikar og løgdu upp í Føroyum á vegnum, har ein partur av rúsevnunum varð lagdur upp.

Í hesum sambandi var løgreglan í Íslandi eisini í Føroyum og samstarvaði við føroysku løgregluni.

Tá ið báturin fór víðari til Íslands, fylgdi danska sjóverjuskipið honum alla tíðina, til íslendskir myndugleikar tóku yvir og handtóku manningina, tá ið báturin kom í Havn.

Bergleif Brimvík sigur, at nú skulu fleiri kanningar gerast í málinum, men harðasta revsing fyri so umfatandi rúsevna-smugling er fongsul í heili 10 ár.

# Ejdesgaard errin av samgonguni

**Løgmaður stendur heilt og fult aftanfyri semjuna í samgonguni um fíggjarlógina og sum heild er hann errin av fíggjarliga politikkinum hjá samgonguni hesi seinastu fýra árini**

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hesi seinastu árini hava vit skapt stóra vælferð í Føroyum. Og tað er ikki ókeypis.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er ógvuliga fegin um at tað eydnaðist samgonguni at finna semju um fíggjarlógini fyri næsta ár, hóast tað leikaði hart á.

Samstundis er hann fegin um, at tað eydnaðist at finna semju um skattalættan.

- Tað er ein semja, sum eg heilt og fult taki undir við, staðfestir løgmaður.

Hann staðfestir eisini, at tey, sum siga, at útreiðslurnar eru hækkaðar nokk so fitt, hava sjálvandi rætt í tí.

Men tað er ikki nakað, løgmaður fær ilt av, tí tað veldst alt um, hvørki tøl, vit samanbera, sigur hann.

- Samanbera vit við tað fyrstu fíggjarlógina, vit gjørdu, er talan um ein stóra hækking. Fyrsta fíggjarlógin hjá hesi samgonguni hevði 250 milliónir í halli, men eftir ætlan fer fíggjarlógin næsta ár at hava 200 milliónir í avlopi.

- Sostatt hava vit bøtt um fíggjarlógina við eini heilari milliard og tað er eitt stórt framstig, sum eg eri errin av, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Rokningin fyri vælferðina

Hinvegin mugu vit eisini staðfesta, at seinastu árini eru vælferðartænasturnar batnaðar heilt munandi, bæði í undirvísing, í eldrarøkt og á øðrum økjum. Eitt nú hava vit fingið eini 170 røktarheimspláss afturat hesi seinastu árini og tað mugu vit sjálvandi betala fyri.

- Tað eigur ikki at koma óvart á nakran, at vælferðartænastur eru dýrar og tað er hetta sum er ein týðandi orsøk til vøksturin á fíggjarlógini.

Harafturat hava vit lagt upp fyri fullum endurgjaldi fyri tær lønarhækkingar, sum hava verið og sostatt virða vit allar sáttmálahækkingar til fulnar og bara tað kostar 70 milliónir.

- Av tí sama er tað væl skiljandi, at útreiðslurnar hækka, sigur løgmaður.

Hinvegin staðfestir hann eisini, at fíggjarlógin eisini tálmar búskapinum, tí skattalættin minkar, avgjøld á sigarettir og góðgæti hækka og ílegukarmurin er trengri enn hann hevur verið.



*Jóannes Ejdesgaard fegnast um at tað eydnaðist at finna semju í samgonguna. Hann heldur, at forkláringin upp á hækkingarnar er bæði skilagóð og natúrlig*

Hinvegin staðfestir løgmaður, at tað hevði verið ein ólukka fyri samfelagið at traðka ov hart á bremsurnar nú.

- Tvørturímóti mugu vit halda fast um bjartskygni og framburðin og tí sambandi mugu vit fáa fleiri hendur í arbeiði fyri at sleppa undan teimum fløskuhálsum, sum eru, sigur løgmaður.